# Á KAMBSDALI FHK

Føroya Handilsskúli í Eysturoynni húsast í tveimum rímuliga nýggjum bygningum. Annar á Kambsdali og hin í Søldarfirði.

Á skúlanum ganga 200 næmingar, ið taka Høgri Handilsskúla-útbúgving. Eisini hýsir skúlin skeiðsvirksemi av ymiskum slagi og høgri útbúgvingum. Á skúlanum er matstova, gott netsamband, rúmlig flokshøli og góð felagshøli.
Skúlin byrjaði í nýggjum bygningi 1990 og er ein nútímans og nútíðarhóskandi skúli, ið lýkur øll nútíðarkrøv. Árni Winther arkitektar hava teknað skúlan.







